# Seta kynsligan ágang ovast á breddan

*Felagsskapurin Barnabati skipar um góða viku fyri ráðstevnu á Hotel Føroyum, har evnið er kynsmisnýtsla av børnum og hvussu hetta kann fyribyrgjast, hvørjar fylgjurnar eru fyri børnini og hvat kann gerast fyri at hjálpa*



*Um góða viku skipar Barnabati fyri ráðstevnu á Hotel Føroyum*

DAGFINN OLSEN

Mánadagin 27. mars og týsdagin 28, mars skipar Barnabati fyri ráðstevnu á Hotel Føroyum.

Evnið, ið verður sett ovast á breddan, er millum teirra, ið ofta verður tagt burtur. Eitt sonevnt tabu. Barnabati setur kynsmisnýtslu á breddan.

Oftari og oftari er at hoyra um mál, ið hava samband við kynsmisnýtslu av børnum.

Jórun Madsen, nevndarlimur í Barnabata sigur, at tíverri er evnið sera aktuelt í Føroyum í dag. Eingin ráðstevna hevur verið um evnið áður.

Endamálið við felagsskapinum er at gera okkurt fyri at hjálpa børnum.

Jórun Madsen sigur, at Barnabati arbeiðir saman við Red Barnet í Danmark. Har hava tey viðgjørt sama evnið og vóru til reiðar at hjálpa til við ráðstevnuni í Føroyum.

Nógv fólk hava teknað seg til og stórur áhugi er. Øll, sum hava við børn at gera, er vælkomin at luttaka. T.d. eru barnaverndirnar kring landið við og lærarar, pedagogar og sosialráðgevar.

### Øll vælkomin

Men ráðstevnan vendir sær ikki til nakran ávísan og øll eru vælkomin at luttaka.

Ráðstevnan er skipað við fyrilestrum og workshops - ella arbeiðsbólkum.

Bæði føroyingar og danir fara at halda fyrilestrar, ið hava heiti sum t.d. »Kynsligur ágangur í Føroyum – ein trupulleiki, ið tagdur verður burtur«, »Sálarligar fylgjur av kynsligum ágangi«, »Revsing og viðgerð« og »Hvat eyðkennir misnýtt børn«.

Tey, ið halda fyrilestrarnar, eru fólk, ið starvast við evninum dagliga.

### Egna skrivstovu

Jórun Madsen sigur, at Barnabati hevur ikki verið so nógv í samband við trupulleikan. Felagsskapurin hevur verið hildin uppi av sjálvbodnum arbeiði og hevur júst leigað seg inn á Bryggjubakka í Havn og sostatt fingið egna skrivstovu, so tað er avmarkað, hvussu nógv Barnabati hevur verið frammi alment.

Felagsskapurin hevur annars eina sonevnda Barnatelefon, ið ringjast kann til, um okkurt er áfatt.

Jórun Madsen sigur, at sagt verður, at trupulleikin við kynsligum ágangi hevur altíð verið, men er komin meira fram í ljósið. Men tað er keðiligt, at evnið skal vera so aktuelt í Føroyum í dag, heldur hon.

Men samstundis metir hon, at ein eigur at hava bæði beinini á jørðini og vera varin og ikki ganga og vera bangin fyri øllum. Hetta er eisini eitt evni á ráðstevnuni á Hotel Føroyum um eina góða viku.

# Nógvir tænastumenn sjúkir í hesum døgum

*Kring um í skúlunum eru sáttmálasettu lærararnir raktir av fyrsta arbeiðssteðgi í søgu Føroya Lærararfelags. Men sera ymiskt er, hvussu heilsustøðan er hesa vikuna hjá lærarum, ið eru tænastumenn*



DAGFINN OLSEN

Á størru skúlunum kring landið er ymiskt, hvussu gongur at halda tímatalvuna.

Yngru og sáttmálasettu lærararnir eru raktir av arbeiðssteðgi. Men sera ymiskt er, hvussu heilsustøðan er hesa vikuna hjá lærarum, ið eru tænastumenn.Talið av sjúkum tænastumonnum í gjár er skelkandi.

Í Havn er heilsustøðan hjá tænastumonnunum í skúlunum sera vánalig.

Í Kommunuskúlanum í Havn sigur stjórin, at talan er um kaos og støðan er vónleys. Har eru 40 lærarar. 16 teirra eru í arbeiðssteðgi, men harafturat eru 6 lagstir sjúkir.

Á Eysturskúlanum í Havn er sama støðan. Av teimum 43 lærarunum, eru 18 í arbeiðssteðgi. Men umframt vóru í gjár 9 lagstir sjúkir. Stjórin bar skúlan saman við ein friðarligan bygdaskúla.

Á Venjingarskúlnaum í Havn starvast vanliga 41 lærarar. 17 teirra eru raktir av arbeiðssteðgi og umframt lógu 11 sjúkir í gjár.

Eisini í Klaksvík merkist fyribrigdið.

Á Skúlanum við Ósánna er tey sloppin væl. Eingin lærari er sjúkur, men 11 av teimum 29 lærarunum eru raktir av arbeiðssteðgi.

Verri er á Skúlanum á Ziskatrø. Har er virksemið óregluligt. Har starvast vanliga 35 lærarar, harav 8 eru í arbeiðssteðgi. Umframt eru 9 tænastumenn lagstir sjúkir.

Í Suðuroynni er heilsustøðan hjá lærarum góð. Men eisini har merkist arbeiðssteðgurin.

Hóast sjúka millum tænastumenn ikki ger seg galdandi har, so er virksemið í skúlunum á Tvøroyri og í Vági darvað.

Í Vági eru 4 av teimum 22 lærarunum raktir av arbeiðssteðgi, men tænastumenninir eru enn við góða heilsu.Tó hevur verið neyðugt við ymsum nýggjum ætlanum, fyri at fáa skúlan at virka

Á Tvøroyri eru 7 av teimum 25 lærarunum raktir av arbeiðssteðgi, men eingin tænastumaður er raktur av sjúku. Har sigur stjórin, at næmingarnir hava skikkað sær væl, men eru farnir at troyttast av, at so nógvir millumtímar eru, har eingin lærari er.

Í skúlanum á Giljanesi vestri í Vágunum merkist arbeiðssteðgurin. 5 av teimum 25 lærarunum eru raktir av arbeiðssteðginum. men eisini har er heilsustøðan milum tænastumenn góð og øll eru til verka, ið eiga at vera.

Sum heild meta skúlastjórarnir á størru skúlunum kring landið, at støðan er álvarslig. Nakrir teirra meta, at talan verður um langan arbeiðssteðg.

Eisini bera teir banga fyri børnunum, tí ein ávís skylda, juridisk og moralsk, hvílur á skúlunum viðvíkjandi børnunum. Og sjálvsagt er í huganum hjá skúlaleiðslunum, hvat kann henda børnunum, nú starvsmegin er viknað, og vánaligt eftirlit er við børnunum.

# Nýtt kjakforum

Í fjør gjørdist heimasíðan hjá Starvsmannafelagnum dyggasta tíðindakeldan, meðan arbeiðssteðgur var, m. a. tí loftmiðlatíðindafólk vóru í verkfalli. Eisini var lívliga kjakast á heimasíðuni. Føroya Lærarafelag hevur nú á síni heimasíðu gjørt slíkt forum, nevnt alment kjak, har ein kann kjakast ella koma við viðmerkingum. Í dag verður álitisfólkafundur í Føroya Lærarafelag.






# Einkarrætturin er brotin

*Einjarrætturin á teleøkinum er nú brotin. Fyri fáum døgum síðani byrjaði Tele-Tech í Havn at bjóða út tráðleyst internetsamband og fyrstu kundarnir eru longu komnir til høldar. Thormann Kruse, stjóri, sigur, at teir hava valt at byrja í smáum, men nú er hol sett á*



*Thorman Kruse er stjóri í TeleTech. Hansara fyritøka er tann fyrsta sum bjóðar annað internetsamband enn tað, sum Føroya Tele bjóðar og kundar, sum keypa internethald frá TeleTech fáa tráðleyst samband við internetið. – Ein tann størsti fyrimunurin er, at netsambandið er nógv skjótari enn sambandið, sum koyrir um telefonlinjuna, sigur hann*

**Mynd: Jonhard Hammer**

SVEINUR TRÓNDARSON

Menningin á teleøkinum gongur skjótt fyri seg. Í blaðnum í gjár skrivaðu vit um ein útbjóðara, sum av álvara ætlar sær at taka kappingina upp við Føroya Tele, men hesar reglurnar snúgva seg um ein útbjóðara, sum longu er farin ígongd.

Framferðarhátturin er ikki tann sami og kappingin Føroya Tele fær er í fyrsta umfari avmarkað, men tað týdningarmesta er, at teir nú fáa kapping.

Tað heldur Thormann Kruse, stjóri á TeleTech í hvussu er. Fyri nøkrum mánaðum síðani var hann tann fyrsti, sum fekk loyvið til at fara at kappast við gomlu landsfyritøkuna, og nú er hann tann fyrsti, sum hevur tikið dystin upp.

### Tráðleyst samband

Í fyrsta umfari hevur Thormann Kruse valt at leggja seg eftir at bjóða kundum sínum internetsamband, sum Føroya Tele ikki bjóðar.

Kundarnir, sum keypa internetsamband frá TeleTech, keypa tráðleyst samband. Tað merkir, at teirra samband við internetið ikki fer um telefonlinjuna, men Thormann Kruse sigur, at sambandið er eins gott, um ikki betri enn internetsambandið um telefonina.

– Størsti fyrmunurin er, at brúkarin fær eitt nógv skjótari netsamband enn tað, sum Føroya Tele kann veita. Tráðleyst samband er av góðum grundum ikki ávirka av telekáplum, sum avmarkað skjótleikan í sambandinum við internetið, sigur Thormann Kruse.

Ein annan fyrimun sigur hann vera, at kundarnir av somu orsøk ikki nýtast fáa sær t. d. ISDN samband, sum eisini ger netsambandið skjótari, men sum kostar lutfalsliga nógv at nýta.

### Avmarkað kapping

Nú TeleTech hevur valt at taka kappingina upp við Føroya Tele, er tað, sum nevnt í fyrsta umfari bert á internet økinum. Men Thormann Kruse sigur kortini, at tað ikki merkir, at TeleTech í framtíðini ætlar at avmarka sítt starvsøkið til bert at umfata internetið.

– Vit hava valt at byrja í smáum fyri at koma ígongd. Vit hava gjørt royndarkoyringar síðani miðjan januar mánað og tær koyringarnar eru nú lidnar. Tí valdu vit at fara til verka við hesum partinum nú, sigur Thormann Kruse.

Eitt økið, sum ikki er óhugsandi, at Tele-Tech eisini fer í holt við, er IP-telefoni, men tað verður ikki enn.

– Fyri okkum hevur tað týdning at koma ígongd við okkara virksemi, sigur Thormann Kruse.

### Fyrst Havnin - síðani bygdirnar

Sum í so mongum førum tá broytingar henda, so eru tað borgararnir í høvuðsstaðnum, sum fyrst fáa gagn av teimum. Soleiðis er eisini í hesum førinum, men stjórin í TeleTech sigur við Sosialin, at ætlanin er eisini at taka bygdirnar við.

– Vit hava sett ein POP upp hjá Rás Tórshavn og hann røkkur bara teimum brúkarum, sum liggja í Havn og her um leið, men er áhugi og undirtøka, so fara vit eisini at hyggja at bygdunum, sigur Thormann, sum leggur afturat, at næsta málið á teirra skrá er Eysturoyggin.

Støðin, sum TeleTech hevur sett upp í Havn er í fyrsta umfari tað teir kalla ein »Port of Presence« og tað er ta støðina, sum brúkararnir í Havn samskifta við. Ætlanin er eisini at seta eina servarastøð upp har, soleiðis at kundar kunnu leggja teirra heimasíður á servara hjá TeleTech, men eisini tað er nakað, sum kemur seinni, greiðir Thormann frá.

Í fyrsta umfari var ætlanin, at bjóða sjálvt internetsambandið út og tað er tað sum nú er byrjað.

### Lægri prísur

Tað, sum sjálvandi hevur verið tosað um í sambandi við ein nýggjan netútbjóðara, er prísurin og her sær út til, at TeleTech stendur rættiliga væl.

Í fyrsta umfari leggur TeleTech seg eftir at fáa fatur á vinnulívskundum, og tann prísurin er, eftir tí, sum vit hava skilt, kappingarførur við tað, sum Føroya Tele bjóðar.

Fyribilsprísirnir hjá TeleTech eru lægri enn teir eru hjá Føroya Tele, bæði tá tosað verður um íbinding, rakstrargjald og til nýtslugjaldið. Og tí verður spennandi at síggja um nýggi kappingarneytin fer at hava við sær, at prísirnir hjá Føroya Tele fara at lækka.

## Fakta um

## TeleTech Sp/F

Nýggjasti útbjóðarin á teleøkinum eitur TeleTech og stjóri í fyritøkuni er Thormann Kruse.

Í fyrsta umfari verður dentur lagdur á. at bjóða út tráðleyst internetsamband til fyritøkur. Nær TeleTech fer at bjóða út tráðleyst internetsamband til einstaklingar er ikki greitt.

Um ikki so langa tíð, fer eisini at vera møguligt hjá fyritøkum at keypa servarapláss á servara hjá fyritøkuni.

### Prísir

Samanbera vit prísirnar sum TeleTech brúkar í løtuni, so er fyritøkan kappingarfør við Føroya Tele. (Prísirnir skulu kortini takast við fyrivarni!)

| | | TeleTech | Før. Tele |
|---|---|---|---|
| Stovningarkostn. | | 20-25.000 | 40.000 |
| Rakstrargjald | 64 kb/s | 539 | |
| | 128 kb/s | 834 | 1.395 |
| | 256 kb/s | 1.126 | |
| | 512 kb/s | 1.464 | |
| Nýtslugjald pr. Mb/mánað | | 1,25 | |
| Før. Tele: | | | |
| | undir 1/2 Gb/mán. | | 2,00 |
| | 1/2-1 1/2Gb/mán. | | 1,50 |
| | meiri enn 1 1/2 Gb/mán. | | 1,00 |


Konfirmatións-
klæðir til
hansara

fáast í
Kallkyn
Vágsbotnur - tlf. 31 62 06